# Millum oyggjarnar í kajakk

**Fýra sviar ferðast í hesum døgum í Føroyum við kajakk. Tey ætla sær at rógva bæðin innan- og uttansyndis millum oyggjarnar**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*


*Svensku kajakkrógvararnir, sum eru í Føroyum í løtuni, hava ferðast víða við hesum smáu førunum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Sandavági:** Tey eru limir í einum kajakkfelag í Helsingborg í Svøríki, hesi fýra fólkini, sum um dagarnar síggjast ymsastaðni kring landið við sínum kajakkum.

Tey hava ikki verið í Føroyum fyrr, men hava eftir førimuni roynt at fyrireikað seg sum frægast til føroysk viðurskifti, greiða tey frá.

Tey hava fingið sær kort, tó ikki sjókort, yvir Føroyar, og hava annars roynt at fingið upplýsingar av ymsum slag um landi og serliga farvatnið kring oyggjarnar.

Hendan dagin, Sosialurin hitti tey á sandinum í Sandavági, ætlaðu tey at fara ein túr fram við landi út móti Trøllkonufingri og kanska Presttanganum. Dagin fyri høvdu tey veirð á Sørvági og høvdu róð út á Pollin í Tindhólmi og síðan tvørtur um fjørðin inn at lendingini í Gásadali, men vóru kortini ikki farin í land nakrastaðni.

Tey vóru áhugað í at vita um streym, og hvat veðurtíðindini søgdu. Høvdu ætlanir um at rógva úr Vestmanna til Saksunar. Tó var ikki vist, at tað fór at verða til nakað, tí júst tá varð sagt frá útnyrðingi, og tað, roknaðu tey skjótt út, fór ikki at vera nøkur ætt soleiðis at rógva fram við Vestmannabjørgunum við kajakk í.

Hetta eru fólk, sum eru von at rógva í kajakk, skilst á tosinum. Tey hava ferðast ymsastaðni fram við svensku og donsku strondunum, greiða tey frá.

Kajakkirnar eru væl útgjørdar. Goymslurúm eru aftantil, har lúkurnar verða skalkaðar og stongt verður við lykli fyri at tryggja, at sjógvur ikki sleppur til. Tað sama er framman fyri mannholið, eins og rundan um tann, sum rør, skalkað við gummidúki, sum situr stramt um persónin, so heldur einki sleppur niður tann vegin.

Og kortini er einki sikkurt, so ein hondpumpa liggur bundin frammam fyri mannin. Har liggja eisini kumpass og kort í plastikhylki, so sjógvur ikki sleppur at.

Umframt árarnar er eisini róður at stýra við, hóast tað er lítið. Ein endi, sum festur er í báðum borðum, er sambandið hjá manninum við róðrið.

Tey taka hvør sína kajak í hondina. Ikki eru tær tyngri enn so. Leggja tær á sandin. Síðan seta tey seg í tær og skumpa so við hondunum, til tey flóta. Fara so spakuliga út við Sondum og hvørva undir brimgarðsendanum Úti á Bakka.

# Byggja eldrasambýlið út

**Eiðis Kommuna hevur samtykt at byggja eldrasmabýlið á Eiði út við fimm búplássum. Arbeiðið veður helst gjørt í ár**

ELDRAØKIÐ
*Edard Joensen*


*Fimm búpláss og eitt arbeiðsrúm verða nú innrættað í niðaru hæddini í Korndalsbýlinum*

**Eiði:** Tørvurin á eldrabústøðum á Eiði er vaksandi, og størri enn eldrasambýlið Korndalsbýlið kárar at nøkta í løtuni. Tí er gjørt av at innrætta fimm búpláss afturat í húsinum.

Tordur Niclsen, borgarstjóri á Eiði, sigur, at tørvurin á búplássum til eldru borgararnar í kommuni er vorðin so mikið stórur, at hann verður ikki nøktaður við verandi tilboðum.

Tá Korndalsbýlið varð bygt, varð bara ovara hæddin innrættað við 10 búplássum. Men tá var kortini lagt upp fyri, at eini seks búpláss aftur at kundu verða innrættað í kjallaranum.

Hetta verður nú gjørt, sigur borgarstjórin. Tó so, at búplássini verða fimm, og eitt rúm verður gjørt til arbeiðsrúm.

Søkt er um stuðul frá Almanna- og Heilsumálaráðnum, sigur Tordur Niclasen. Samlaða íløgan fer at liggja um knappa hálva aðru millión krónur, sigur hann. Hann væntar, at farið verður undir arbeiðið heilt skjótt, og at tað helst verður liðugt í ár.

Umframt at hava tey fimtan búplassini í eldrasambýlinum Korndalsbýlinum á Eiði, er Eiðis Kommuna eisini við í samstarvinum við Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi.

# Hydro-Tech afturlatið

**Tað er so lítið at gera í alivinnuni, at smiðjan á Eiði, sum hevur livað av tænastum til alivinnuna, er latin aftur. Fólkið er flutt á Kambsdal at arbeiða hjá KJ-Hydraulik**

AFTURGONGD
*Edvard Joensen*


*Hydro-Tech byrjaði í bygninginum fremst á myndini. Seinni vórðu stóru hallirnar aftast á myndini bygdar til smiðju, og gamla smiðjan seld. Nú standa stóru hallirnar tómar og verða helst lýstar til sølu fyrsta dagin*

**Eiði:** Tað stendur einki til soleiðis hjá tænastusmiðunum. Og á Eiði er smiðjan hjá Hydro-Tech, sum hevur lagt seg eftir at veita tænastur til alivinnuna, afturlatin. Fólkið er flutt til KJ-Hydraulik á Kambsdali, sum eigur Hydro-Tech, at arbeiða. Onkur valdi tó at fara aðrastaðni.

Eini 10-12 arbeiðspláss eru færri á havnarlagnum á Eiði, enn tey vóru fyri stuttari tíð síðan. Umstøðurnar hjá alivinnuni hava havt ta beinleiðis ávirkan, sigur Jón Eliasen, tekniskur stjóri hjá KJ-Hydraulik á Kambsdali, at smiðja teirra, Hydro-Tech á Eiði, er afurlatin.

Hydro-Tech hevði lagt seg eftir at veita tænastur til alivinnuna mestsum burturav. Slíkt, sum brúkast skuldi á brúkunum, og ikki minst at smíða bátar til alivinnuna. Kendar eru tvíkiljurnar, sum síggjast við alibrúkini millum oyggjarnar. Eisini eru bátar útfluttir. Bæði til Skotlands og til Íslands.

Men har sær púra einki út heldur, sigur Jón Eliasen. Íslendingar gera framvegis onkrar íløgur í alivinnuna, men kappingin um at sleppa at veita teimum tænastur, er øgilig. Tí eisini aðrastaðni enn í Føroyum er tungt hjá alivinuni, og serliga norðmenn kappast á somu økjum sum føroyingar. Eitt nú við at smíða bátar til alibrúkini.

– Hetta er fyrsta barometrið, sum vísir á eina niðurgongd, sigur Jón Eliasen. Tá tænastusmiðjurnar fáa minni at gera, er tað eitt greitt tekin um at, um ikki beinleiðis kreppa, so niðurgongd er á veg. Hetta hava vit sæð í einum javnt afturvendandi »cyklusi«, og tað er nú á veg aftur, sigur hann.

Sum er, stendur smiðjubygningurin á Eiði tómur, og verður helst lýstur til sølu fyrsta dagin, sigur Jón Eliasen. Sjálvir síggja teir ikki nakran møguleika har í løtuni.

– Men hendir okkurt soleiðis, at gongd kemur á aftur eitt nú alivinnuna, kann vera, at vit fara at gera okkurt aftur har, um bygningurin til ta tíð ikki er seldur til annað endamál, sigur hann.

Á Kambsdali er væl av virksemi enn, sigur Jón Eliasen. Skansatangi er til umbyggingar til krabbaveiðu, og tað arbeiðið ger KJ-Hydraulik. Men tá tað er liðugt, er slakari, sum út sær beint nú. Og lítið er av fyrispurningum í løtuni, sigur hann.

Tað arbeiða tilsamans eini 40-50 fólk hjá fyritøkuni.



# Størsti matvøruhandil í Eysturoy stongdur


*Í Runavíkar-økinum hava tveir stórir matvøruhandlar sama eigara, Bónus á Glyvrum og Brotið í Saltangará. - Tá ið sami eigari eigur báðar handlarnar, og vørurnar ganga undan í báðum handlunum, helt leiðslan tað vera rættast bert at hava annan handilin opnan, sigur Fríðbjørg Ljósá, dagligur leiðari í Bónus*

**- Høvdu vit bara havt tann eina handilin í økinum, høvdu vit ikki latið aftur, men matvøruhandilin, Brotið í Saltangará, sum sama firma eigur, verður verandi opin, meðan verkfallið er, sigur Fríðbjørg Ljósá, dagligur leiðari í Bónus**

VERKFALL
*Vilmund Jacobsen*

Mánadagin læt størsti matvøruhandil í Eysturoy, Bónus á Glyvrum, aftur. Tað er sama firma, sum eigur Bónus á Glyvrum og matvøruhandilin, Brotið í Saltangará. Handilin í Saltangará verður verandi opin, meðan verkfallið er, og Bónus letur uppaftur, tá ið verkfallið er av.

### Tómar hillar

Dagligi leiðarin í Bónus á Glyvrum, Fríðbjørg Ljósá, sigur, at nú verkfallið er vorðið so drúgt, hava tey valt bert at hava annan handilin í økinum opnan.

- Tá ið tað er sami eigari, sum eigur báðar handlarnar, helt leiðslan tað vera rættast at hava annan handilin opnan - og ikki báðar, tí nógvar av hillunum standa tómar, og í køli-og frystidiskunum er lítil og eingin vøra eftir.

Hon sigur, at nú bara annar handilin er opin, fara tey væntandi at flyta onkrar vørur út í Brotið, um so er, at vøra er eftir í Bónus, sum er útseld í Brotinum.

- Tað er ikki nógv meining í hjá sama eigara at hava tveir "tómar" handlar standandi opnar, heldur Fríðbjørg.

Hon sigur, at nú Bónus læt aftur, vantaðu næstan allar vørur, sum fólk vanliga keypa.

- Eplir, fruktir og grønmeti vórðu útseld næstan beinanvegin, tá ið verkfallið byrjaði, og síðan eru flestu neyðsynjarvørur, sum fólk dagliga keypa, eisini útseldar.

Hon vísir á, at nú verkfallið hevur vart í smáar tríggjar vikur, er vøruúrvalið í Brotinum størri enn í Bónus.

- Hetta kemst helst av, at Brotið hevur havt fleiri vørur á goymslu, tá ið verkfallið byrjaði.

Fríðbjørg sigur, at nú bakarin, har Bónus og Brotið keypa allar sínar bakaravørur, einki rugmjøl hevur eftir, kann væntast, at lítil gongd verður í handilin næstu dagarnar, tá ið eingi rugbreyð eru at fáa.

- Vit hava tó skilt, at hveitimjøl er eftir, so ivaleyst verður fransbreyð at fáa eina tíð enn, sigur hon.

### Halda frí

Sjey fólk starvast í Bónus á Glyvrum, og sum skilst, hava tey einki ímóti at fáa frí nakrar dagar - bert dagarnir ikki gerast alt ov nógvir.

Týsmorgunin, tá ið vit tosaðu við Fríðbjørg, vóru hon og ein onnur kvinna til arbeiðis.

- Nú kunnu vit gera ymiskt, sum liggur á láni, og sum ikki ber so væl til at gera, tá ið handilin er opin.

Fríðbjørg Ljósá sigur at enda, at tey, sum nú eru farin heim at halda frí nakrar dagar, meðan verkfall er, kanska kunnu loysa av í Brotinum, um tað er ynskiligt.

- Annars hava Bónus á Glyvrum og Brotið í Saltangará hvør síni starvsfólk, leggur hon aftrat.

# Bakaríini í Fuglafirði og á Skála lata aftur

**"Uden mad og drikke, duer helten ikke…" siga tey. Men her er eingin "góða mamma"; tá ið hendan vikan er liðug, er alt mjølið hjá teimum trimum bakaríunum í Eysturoy uppi. Bakaríið í Fuglafirði letur aftur longu í dag, og bakaríið á Skála letur helst aftur fyrst í komandi viku**

BREYÐTROT
*Vilmund Jacobsen*


*Bakaríið, Breyðmolin í Fuglafirði, letur aftur í dag, tá ið bakaravørurnar eru uppi. Tá ið hendan vikan er úti, hava tey trý bakaríini í Eysturoy einki mjøl eftir*

Nógv fólk í Eysturoy hava keypt breyð hesar seinastu dagarnar, nú tað fyrst í vikuni fræettist, at mjølið hjá øllum bakaríunum í Eysturoy av álvara er farið at ganga undan.

### Letur aftur

Bakaríið, Breyðmolin í Fuglafirði, bakar seinastu breyðini í dag, og tá ið útselt er, letur bakarríið aftur.

Í Fuglafirði siga tey, at latið verður ikki uppaftur, fyrr enn einar tveir dagar eftir, at verkfallið er av, tí neyðugt verður at fáa vøruna uppá pláss, áðrenn latið verður uppaftur.

- Enn er ikki greitt, nær í morgin, vit lata aftur, men tá ið bakaravørurnar eru útseldar, og hvørki mjøl ella ger er eftir, er einki at hava opið til, søgdu tey á Breyðmolanum í gjár.

Hjá Miðberg í Saltangará er støðan á leið tann sama sum í Fuglafirði, men sum skilst, er ætlanin ikki at lata bakaríið aftur.

- Rugmjølið verður uppi í dag, men enn hava vit eitt sindur av hveitimjøli eftir. Tískil baka vit bara rugbreyð í dag aftrat.

- Hvussu leingi, hveitimjølið røkkur, er ilt at siga, men tað røkkur so til nakrar dagar aftrat, søgdu tey í Saltangará.

### Bert eitt breyð

Á bakarínum á Skála siga tey, at har er mjølið eisini farið at ganga undan. Tey hava nakað tað sama eftir at rugmjøli og hveitimjøli.

- Vit vænta, at vit hava mjøl til tað, ið eftir er av hesi vikuni; síðan røkkur mjølið ikki longur, og so verður bakaríið helst stongt, tí vit hava so fáar aðrar vørur í handlinum.

Á Skála er "politikkurin" tann, at eingin fær meira enn eitt breyð, tí annars verður einki eftir til teirra, ið ikki hava høvi at keypa fyrr enn seinnapartin.

Bæði í Fuglafirði, í Saltangará og á Skála hevur stórur gravgangur verið eftir bakaravørum seinastu dagarnar, nú fólk hava varhugan av, at mjølið gongur undan hjá øllum bakaríunum í Eysturoy.